# motorsúkklu

Navn: Henning Nissen Bøgesvang
Føðisstaður: Skandelup, Suðurjútland
Føðidagur: 27.03.42
Foreldur:
Dorthea Bøgesvang
Vilads Bøgesvang
Kona:
Solveg Bøgesvang (13.02.41)
Børn
Anders Bøgesvang (31.08.65)
Vilads Bøgesvang (24.02.70)
Abbabørn:
Henning
Martin
Solveg
Lukas
Ria
Kristian
Emilia og Viktoria
Lívrættur: Kalkunsteik

1942: Føddur
1956: Preliminer
1958: Húskallur
1960: Studentaskúla
1962: Teologi
1969: Sjómansprestur í Belgia
1976: Sóknarprestur í Norðoyar vestara prestagjaldi
1988: Sjómansprestur í New York
1989: Sóknarprestur í Norðoyar vestara prestagjaldi
1998: Sjómansprestur í Gøteborg
2008: Sóknarprestur í Sjóvar prestagjaldi

### Eystanvert múrin

Tá Bøgesvang koyrdi turistbuss vóru eisini hendingar, ið vóru meira álvarsamar.

– Einaferð tá ið eg skuldi til Eysturtýsklands við nøkrum ferðafólkum hendi nakað løgið. Vit komu inn í Eysturtýskland, og eg bleiv steðgaður av einum politisti. Eg hevði koyrt 50 kilometur um tíman, sum mann átti, men politisturin segði, at eg hevði koyrt 70. Eg segði tað ikki var rætt, men hann bað um passið hjá mær, sum leyk øll krøv. Síðani segði hann, at eg skuldi gjalda honum pening fyri at fáa passið aftur, og tað mátti eg so bara gera, greiðir presturin frá.

Á heimtúrinum hendu eisini ting og sakir. Tí tá tey skuldu inn aftur í Vesturtýskland, vórðu tey aftur steðgað.

– Teir koyrdu spegl undir bussin, fyri at kanna um onkur hevði goymt seg har. Øll vóru koyrd úr bussinum, og so stungu politistarnir pinnar niður í setrini um so var, at onkur hevði goymt seg har, greiðir hann frá.

### Bjargaði kenningum

Einaferð verkfall skuldi byrja á midnátt, ringdi strandferðslustjórin í Klaksvík til Bøgesvang, tí hann visti, at prestur hevði stóra koyrikorti.

– Hann spurdi meg, hvat ein prestur ger. Eg svaraði, at ein prestur hjálpir fólki í neyð. Tá lat í honum, at hann var í dýrastu neyð, tí báturin skuldi seinasta túrin yvirum, og ongin førari var til Føroya Bjór bilarnar. Eg játtaði sjálvandi at hjálpa, og koyrdi bilarnar umborð á Ternuna, áðrenn verkfallið byrjaði. Tá onkur spurdi meg, hvat eg hevði í bilinum, svaraði eg bara sodavatn, flennir Bøgesvang, sum allarhelst bjargaði onkrari kenningini hendan dagin.

### Vildi vera flogskipari

Hóast Henning Bøgesvang av mongum verður mettur at vera ein sera góður prestur, var hetta als ikki dreymurin, tá hann var yngri.

– Eg vildi verða jetpilotur, men hetta var ógjørligt, tí eg var litblindur. Síðani vóru ætlanir um at gerast djóralækni, men endin var, at eg fór undir at lesa til prest. Helst var orsøkin, at presturin, sum konfirmeraði meg, umboðaði ein góðan og glaðan kristindóm, sum eg fegin vildi gerast partur av. Foreldur míni vóru eisini grundtvigianarar, sum er ein glaður kristindómur, har tað er loyvt at dansa og vera glaður. So hetta kundi eg standa inn fyri, greiðir presturin frá.

Meðan Bøgesvang las gudfrøði, hevði hann nógvar navnframir lærarar. Ein teirra var Lindhardt, sum helt, at bæði himmal og helviti eru á jørð, og at helviti ikki var nøkur ævig støða.

– Lindhardt hevði sjálvur upplivað helviti á jørð, tá hann var í týningarlegu undir øðrum heimsbardaga. Helst var hetta orsøkin til, at hann ikki helt, at helviti kundi vera ævigt, greiðir Bøgesvang frá.

### Tit drupu Jesus

Henning Bøgesvang hevur altíð havt góðan hug at ferðast, og hann heldur, at mamman er orsøkin til hesa trongd.

– Mamma sat ofta við einum atlasi. Hon ferðist ikki nógv sjálv, men í huganum ferðaðist hon ofta, sigur Henning Bøgesvang. Hetta var helst eisini høvuðsorsøkunum til, at hann valdi at gerast sjómansprestur. Bøgesvang dámdi ómetaliga væl at vera sjómansprestur, tí tá slapp hann at gera so nógv praktiskt ting.

– Tá tú ert sjómansprestur, ert tú í einari serligari støðu. Tú tosar við fólk um vanlig ting útfrá teirra fortreytum, fortelur Bøgesvang, sum upplivdi mangt og hvat, meðan hann var sjómansprestur í Antwerpen í Belgia.

Langa fríggjadag helt Bøgesvang prædiku fyri føroyskum og donskum sjómonnum í Antwerpen í Belgia. Hann greiddi frá um Jesu líðing og deyða. Við til gudstænastuna vóru eisini tveir sjómenn úr Danmark, sum fóru í býin aftaná. Mitt um náttina ringdi løgreglan til sjómansprestin og greiddi frá, at hesir báðir sótu í geglinum, tí teir høvdu verið í bardaga.

– Tá eg kom til menninar, spurdi eg, hví teir vóru settir fastir. Annar greiddi frá, at teir høvdu drukkið nakrar øl, og úti á gøtuni høvdu teir møtt einum jøda, sum annar teirra hevði sligið. Nógv fólk og politi varð savnað á staðnum. Tá jøðin kom fyri seg aftur, hevði hann spurt, hví hann var sligin. Og svarið var, at tað vóru jødarnir, sum drupu Jesus. – Men tað eru næstan 2000 ár síðan, greiddi jøðin frá. – Tað kann gera tað sama. Eg hoyrdi tað fyrstu ferð í kvøld, svaraði sjómaðurin.

### Ilt í kortinum

Ein onnur hending presturin kemur í tankar um, er einaferð hann fór til læknan við einum manni.

– Maðurin hevði ilt í rygginum, og vit avgjørdu at fara til læknan við honum. Á rygginum hevði hann tatoverað eitt stórt Evropakort. Tá læknin spurdi, hvar hann hevði ilt, svaraði hann, at tað var í rygginum. Læknin spurdi, hvar á rygginum. Tá var sjómaður skjótur at svara, at tað var í Írlandi. – Hvar í Írlandi, spurdi læknin. – Onkrastaðni nærhendis Dublin, svaraði sjómaðurin.

Einaferð fór Bøgesvang umborð á eitt Mærsk skip fyri at finna ein eykalut til motorin í einum svenskum skipi.

– Tað var stuttligt at síggja reaktiónina, tá teir funnu útav, at presturin hevði skil fyri motorum, sigur fyrrverandi sjómansprersturin.

### Praktiskur prestur

Eisini meðan Bøgesvang var prestur í Klaksvík var hann ofta praktiskur. Ein dagin vildi hann mála hjallin, og stillaði seg upp á ein ølkassa, fyri at røkka betur.

– Eg og Páll á Dul, sum var høgt í metum í Brøðrasamkomuni í Klaksvík, vóru í skúlaráðnum saman. Tá hann sær meg standa á ølkassanum, spyr hann, um tað sømir seg presti at standa soleiðis. Tá svaraði eg soleiðis: Sært tú ikki, at hann er umvendur? Flennir Bøgesvang og vísir til, at ølkassin stóð upp og niður.

Hetta leiðir prestin beinleiðis til næstu hending, tá ið hann skuldi halda gudstænastu í Hósvík og í Hvalvík sama dag, sum hann koyrdi ein lastbil til Miðvágs.

– Eg hevði so lítla tíð, og endin var, at eg koyrdi við lastbilinum til Hósvíkar. Tá eg hevði hildið prædikuna har, skundaði eg mær í lastbilin, enn í prestakjóla. Tað vóru eyguni á hvalvíkingum stór.

### Ein Jólasøga úr USA

Í 1988 búðu Henning og Solveg í USA, har Solveg arbeiddi sum sjálvboðin sjúkrasystir, og Henning var óløntur hjálparprestur hjá sjómanskirkjuni í New York.

Jólaaftan skuldi hann halda jólagudstænastu í Washington. Úti á vegnum, tá hann var á veg heim aftur, fekk hann bráðliga okkurt spískt ímóti rygginum, og fekk at vita, at hann skuldi geva manninum pengarnar.

– Eg eri ein fátækur prestur, so tú skalt ikki rokna við nógvum frá mær, segði eg við hann. Maðurin beinanvegin bað orsaka, men fekk kortini nakrar dollarar. Tá Bøgesvang kom í flogfarið gekk alt rímiliga væl, líka til hann skuldi við bussinum til hús.

– Eg fann ikki heim til Brooklyn, og endaði í einari myrkari smogu. Brádliga var ein rúgva av ungdómum í leðurjakkum á knallertum rundan um meg. Eg var eitt sindur bangin, tí eg slapp ongan veg. Men tey bóðu meg taka tað heilt róligt. Eg bjóðaði teimum sigarettir, hetta var áðrenn sigarettir blivu farligar, og so settu vit okkum niður. Tey spurdu, hvat eg hevði gjørt, og hvat eg hevði sagt við fólkini í Washington. So eg broytti tað eitt sindur, so tað hóskaði betri til ungfólk, og tey lurtaðu.

– Tá eg var liðugur við gleðiboðskapin, spurdu nøkur teirra, um hetta veruliga var tað, sum jólini snúgva seg um. Tí soleiðis upplivdu tey ikki jólini. Tey greiddu mær frá, at heima hjá teimum gekk alt út uppá at vera so fínur sum gjørligt, og tí dámdi teimum betri at vera úti og koyra á motorsúkklu.

– Tað rørdi meg veruliga, at hesir vælbjargaðu ungdómarnir ikki tímdu at vera heima saman við familjuni á jólum, tí tað ikki var pláss fyri síðum hári og leðurjakkum. Tí sjálvandi skal pláss vera fyri øllum.

### Heima í Føroyum

Hóast Bøgesvang ikki er føddur føroyingur, so rópar hann Føroyar sítt heim.

– Tá vit búðu í Svøríki, søgdu vit altíð heima í Føroyum. Men tað er ikki so løgið aftaná 20 ár í landinum. Synirnir eru uppvaksnir her og hava føroyskar konur og nøkur av abbabørnunum búgva eisini í Føroyum. Men heima er eisini í Danmark, tí har havi eg systkin og har eri eg uppvaksin.

Henning og Solveg Bøgesvang búgva nú í Søldarfirði. Ætlanin var annars at flyta til Føroyar at njóta pensionistatilveruna. Men fram til 1. mars verður Henning Bøgesvang í hvussu so er sóknarprestur í Sjóvar prestagjaldi. Og tá hann viðhvørt verður troyttur av at vera prestur, so koyrir hann ein túr við lastbilinum.

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

